Ein mánaði til jóla. GLEÐILIG JÓL øll somul! (so er tað ikki eftir)
**Kvinna, 40 ár**

# Miðlamjarr

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein / Inna Törnroos



*Eg ynski øllum teimum, eg elski, eitt sindur av ørskapi. Tað ger lívið ljóst.*
Johannes Møllehave, danskur prestur og rithøvundur, um lívið. (Møllehave - Kort og Godt)

*Tað er sikkurt tað besta mann ger her í lívinum, tað er at doyggja, so kann jørðin fáa eitt lítið sindur av nyttu burtur úr kroppinum.*
Hanus G. Johansen hugleiðir um lívið (Refleksjón)



Norður-koreanarir høvdu ivaleyst havt gott av at verið eitt sindur Sunnari....
**Maður, 40 ár**



*Tað er nógv truplari at vera mamma enn sjónleikari.*
Helena Bonham Carter tekur steðg frá arbeiðnum í Hollywood fyri at brúka meira tíð saman við sínum børnum. (The Sun)

Sonur mín brúkti akk gittarin sum pott... Ja, hann gjørdi nr 2!
**Maður, 35 ár**



*Hava tykur kenning?*
Gekkaverturin Magnus Magnussen spyr ungan vinnara, sum er í larmutum selskapi (Gekkurin)

Tað er betur at hava leyst lív, enn slett onki lív.
**Maður, 45 ár**

*So vil eg ikki sita við ábyrgdini longur.*
Helena Dam á Neystabø vil hava skúlareformarnar gjøgnumførdar innan næsta skúlaár, annars gevst hon sum landsstýriskvinna. (Sosialurin)



No sun, no warmth, no flowers, no birds = No vember.
**Kvinna, 45 ár**

*Vit mugu broyta kósina, so at ungdómurin og serliga mistaðarøkið kennir seg aftur í Fólkaflokkinum.*
Annika Olsen heldur, at samleikin hjá Fólkaflokkinum skal dagførast (Rás2)



Nú jólini nærkast, eru vit øll meira ella minni grannskoðarar. Eisini grannar okkara.
**Kvinna, 42 ár**